# Eingin vegur aftur

*Tað eru so stórir fyrimunir við nýggju fólkaskúlalógini, at er óhugsandi at fara aftur til gomlu skipanina, heldur skúlastjóri í Havn*



Eyðun Klakstein

Nýggja fólkaskúlalógin er vorðið stríðsmál millum tey, sum varða av fólkaskúlanum og tey, sum sita á almenna pengakassanum.

Fólkaskúlalógin, sum kom í gildi 1. august 1998, krevur nógv meira av skúlum og lærarum, og tí er neyðugt við nógv fleiri pengum til fólkaskúlan enn hildið varð, tá lógin varð sett í gildi.

Landsstýrismaðurin við fíggjarmálum segði í vikuni við Útvarpið, at um nýggja fólkaskúlalógin skal kosta so nógvar pengar, má hon broytast.

Hetta er óhugsandi sambært teimum, sum varða av fólkaskúlanum.

– Tað hevði verið ein ólukka fyri skúlan, um lógin varð broytt til nakað verri, sigur Niels Nattestad, sum er stjóri á Venjingarskúlanum í Havn.

– Nýggja skipanin krevur nógv meira av lærarunum, tí teir skulu veruliga fyrireika seg og samstarva. Og heldur enn at broyta lógina aftur, eiga pengar at fylgja við, so tað letur seg gera at gjøgnumføra nýggju lógina, sigur hann

### Fleiri pengar, takk

Fólkaskúlarnir í Havn hava – meira enn aðrir skúlar í landinum – lagt á annan bógv við 10 . flokki. Teir bjóða næmingunum serligar breytir, og hesar hava við sær størri arbeiðstrýst á lærararnar. Men kring landið eru nógvar broytingar gjørdar í undirvísingini av næmingunum.

Føroya Lærarafelag vil ikki finna seg í, at meira arbeiði verður lagt á lærararnar, uttan at pengar fylgja við. Og hetta er eitt av stóru stríðsmálunum í sáttmálasamráðingunum, sum eru steðgaðir.

– Lærarafelagið er á rættari leið, tí nýggja skipnain hevur meira arbeiði við sær, og tí mugu fleiri pengar eisini játtast til fólkaskúlan. Tað er fullkomiliga óhugsandi at fara aftur til gomlu skipanina, og eg ivist ikki í, at politikararnir fara at skilja hetta, sigur Niels Nattestad, skúlastjóri.

Í løtuni gongur við ferð fram móti einum verkfall í fólkaskúlanum.

*Óhugsandi er at fara aftur til gomlu skipanina, sigur Niels Nattestad, skúlastjóri á Venjingarskúlanum*

# Velja sær 10. flokk

*Í vikuskiftinum skulu næmingarnir í fólkaskúlunum í Havn velja, hvat tey vilja takast við í seinasta fólkaskúlaárinum*

Eyðun Klakstein

Næmingarnir, sum fara í 10. flokk í einum av framhaldsdeildunum í høvuðsstaðnum komandi skúlaár, skulu taka eina stóra avgerð í vikuskiftinum.

Tá skulu tey avgera, hvørjari breyt tey hava hug at ganga á seinasta fólkaskúlaárið.

Nýggja fólkaskúlalógin hevur havt við sær ein øðrvísi 10. flokk. Serliga í Havn, har næmingarnir kunnu nú velja millum 10 ymsar breytir, har tey fáa serliga vitan, royndir og undirvísing á einum øki.

Eingin lærugrein er kravd í 10. flokki longur, og tí er tað upp til teir einstøku skúlarnar og næmingarnar at leggja seinasta fólkaskúlaárið til rættis. Nógvir skúlar hava ikki gjørt stóru broytingarnar í undirvísingini, eftir at nýggja fólkaskúlalógin kom í gildi fyri hálvum øðrum ári síðani, men í høvuðsstaðnum eru tey farin á ymsar breytir at skreiða fram móti víðari skúlagongd.

Summi hava hug til tónleik ella ítrótt, meðan onnur heldur vilja arbeiða við samfelags- ella vinnulívsevnum. Og øll hesi tilboð, og onnur, eru til taks, tá høvdini hetta vikuskifti skulu leggjast í blot.

### Lærararnir boykottaðu kunningina

Í vikuni vórðu næmingarnir kunnaðir um tær ymsu breytirnar, og um hvussu tey skulu velja.

Men kunningin fekk eitt skot fyri bógvin, tá Føroya Lærarafelag heitti á sínar limir, um ikki at taka lut í kunningini. Hetta hevur tilknýti til sáttmálasamráðingarnar, sum eru í løtuni.

– Hetta var stórt spell, tí tað eru lærararnir, sum sita við royndunum frá teimum ymsu breytunum, og tí kundu teir givið nágreiniliga kunning um tað, sum fer fram, og tað, sum krevst av næmingunum, sigur Niels Nattestad, stjóri á Venjingarskúlanum í Havn.

Leiðslurnar í skúlunum í Havn gjørdu sítt til at kunna um breytirnar, og á næmingarnir skulu møta aftur í skúlanum eftir vikuskiftini, skulu tey hava gjørt upp við seg sjálvi.

Tá skulu tey lata inn valini, sum tey hava gjørt.

Næmingarnir kunnu velja millum náttúru-, vinnulívs, sjóvinnu-, samfelags-, ítrótta-, lista-, miðla-, handverks-, tónleika- og húsarhaldsbreyt. Allar hesar breytir eru lýstar í einum litríkum faldara, sum skal virka sum sølufremjandi tiltak fyri 10. flokki.

Vel tær tí egna 10. flokk, er boðskapurin, og grundgevingarnar fyri skipanini eru bæði stórar og smáar. Næmingarnir skulu búnast og mennast, og teir skulu hava eitt øðrvísi spennandi skúlaár.

### Ein breyt uppsøgd

Summar breytir eru betri umtóktar enn aðrar. Tað eru serliga ítrótta- lista- og miðlabreytin, sum nógvir næmingar hava hug til.

Ein breyt varð uppsøgd til komandi skúlaár. Tað var lestrarbreytin, sum næmingarnir høvdu lítlan áhuga fyri. Ein onnur breyt varð ikki gjøgnumførd í hesum skúlaárinum, og tað er samfelagsbreytin, men hana hava næmingarnir aftur møguleika at velja í ár.

– Vit vóna, at tað fer at bera til at gjøgnumføra allar 10 breytirnar, og at allir næmingarnir fáa tað breytina, teir hava bestan hugin til, sigur Niels Nattestad, skúlastjóri.

Tað er einki krav um, hvussu nógvir næmingar skulu verða til hvørja breyt. Hetta metir leiðslan um, eftir at næmingarnir hava valt.

– Skipanin við breytunum ger, at so at siga allir næmingarnar sleppa at takast við okkurt, sum teir hava hug til, og vit eru sum heild sera vælnøgd við hesa skipan. Hon hevur skapt økt samstarv millum skúlarnar í Havn, og næmingarnir hava fingið nýggjar møguleikar í 10. flokki.

Tveir dagar verða brúktir hvørja viku til breytirnar, og hinar dagarnar eru lærugreinirnar meira vanligar. Men eingin lærugrein er kravd í 10. flokki, og tí skulu næmingarnir sjálvir avgera, hvat tey skulu brúka teir kravdu 28 tímarnar um vikuna til.

Fleiri enn 150 næmingar skulu í vikuskiftini avgera, hvørja breyt tey skulu velja.





KAYSTEN TURID


## Kundi tú hugsað tær at verið á úrvalsliði ?

Á virki okkara eru nógvir **góðir leikarar**. Men tað er fyrst og fremst gjøgnum samarbeiði, at vit hava skapt eitt sterkt lið. Nú hava vit pláss fyri nøkrum leikarum afturat, og vit sóknast tí eftir evnaríkum persónum við áræði, ambitiónum og hugi at vera við á einum liði, har nógv er at gera, og har arbeitt verður í einum góðum og óhátíðarligum umhvørvi.

**Rasmussen & Weihe** er eitt grannskoðara- og ráðgevingafelag, sum varð stovnað í 1968. Umframt at gera lógarbundna grannskoðan ráðgeva vit á ymsum økjum, t.d. viðvíkjandi roknskapi, bókhaldi, stovnan av virkjum, rakstrarætlanum, skattamálum v.m. Umframt høvuðsskrivstovuna í Tórshavn hava vit eisini skrivstovuhøli í Saltangará.

Ein **útbúgving** hjá okkum gevur eisini møguleikar uttanlands. Í altjóða høpi er felagið limur í heimsins størstu grannskoðarafyritøku PricewaterhouseCoopers, ið hevur meira enn 150.000 starvsfólk í 150 ymsum londum, og hetta samstarv gevur okkara starvsfólkum møguleikar at fáa sær arbeiðsroyndir uttanlands - í princippinum allastaðni, har PricewaterhouseCoopers er umboðað.

Sjálvandi dámar okkum best, at starvsfólk, ið gera eitt gott arbeiði, ynskja at verða verandi í virkinum hjá okkum. Men vit mugu ásanna, at nógv virki leita sær eftir dugnaligum starvsfólki hjá okkum. Hevur tú **viljan og evnini** til at gjøgnumføra eina útbúgving hjá okkum, hevur tú óivað nógvar møguleikar í framtíðini. Hugsar tú frammanundan um víðari útbúgving í útlondum, átti tú kanska í staðin at hugsa um at komið á liðið hjá okkum.

Sjálvt um vit tilætlað gera alt fyri at varðveita okkara góða og óhátíðarliga arbeiðsumhvørvi, má ásannast, at **grannskoðan** í sjálvum sær er eitt álvarsmál. Endamálið við grannskoðan er at gera tað arbeiði, ið er neyðugt fyri at átekna upplýsingar frá einum virki til umheimin. Ein átekning, ið sigur, um upplýsingarnar eru rættvísandi. Í hesum sambandi er neyðugt at læra, hvussu grannskoðanin skal útinnast, og hvat krevst fyri at gera eina átekning. Í okkara arbeiði verður tó eisini ofta neyðugt at ráðgeva innan ymisk øki, og hartil krevst eisini **teoretisk og praktisk vitan**. Lóggávan setir stór krøv til fakliga støðið hjá einum grannskoðara, men innanhýsis setir felag okkara enn størri krøv til dygdina av tí arbeiði, ið gjørt verður. Talan er eisini um stór krøv til persónligu eginleikarnar hjá einum grannskoðara. Hann skal m.a. vera ábyrgdarfullur, álítandi, trúverdur og skilja týdningin av tagnarskylduni.

Fakliga støðið verður uppbygt gjøgnum **teoretiska útbúgving og starvsvenjing** - sigast má tó beinanvegin, at neyðugt er, at tú sjálv(ur) tekur eitt stórt tak.

Vit vænta at tú hevur tikið ella tekur **students-, HF ella HH prógv** í summar, og at tú ert áhugað(ur) í eini búskaparligari útbúgving. Tú var/er eisini millum tey stinnastu í flokkinum hjá tær og hevur hug at sameina eina teoretiska útbúgving við eina praktiska útbúgving. Eisini heldur tú tað vera spennandi at sleppa at virka í vinnulívinum.

Vit bjóða tær eitt **lærupláss**, har tú í fyrstu syftu kanst lesa HD, samstundis sum tú vinnur pening. Vit geva tær møguleika fyri eini búskaparligari útbúgving, ið ikki fæst betri í Føroyum, og sum til fulnar er á sama støði sum tað, ið verður bjóðað aðrastaðni. Aftan á **HD** hevur tú fleiri møguleikar. Velur tú at lesa cand. merc. aud. sum fulltíðarlesandi í Danmark, kanst tú fáa farloyvi, og kanska kunnu vit útvega tær arbeiði í lestrartíðini hjá PricewaterhouseCoopers í Danmark. Tú kanst eisini velja at lesa cand. merc. aud. sum sjálvlesandi, samstundis sum tú arbeiðir í Føroyum. Aftan á cand. merc. aud. er møguleiki at gerast statsautoriseraður grannskoðari. Hevur tú vilja, evni og rættan hugburð, stuðla vit tær sjálvsagt so nógv sum gjørligt í at fullføra tað, sum tú setur tær fyri.

Størvini skulu setast eftir summarfrítíðina ár 2000, men longu í apríl mánaði kunnu vit gera eina setanaravtalu.

Ynskir tú aðrar upplýsingar, kanst tú ringja til okkara og seta teg í samband við Ole Guldborg Nielsen ella Klaus Rasmussen.

Skrivlig umsókn við prógvum og øðrum upplýsingum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi ultimo mars 2000.

Sosialurin - 311820




HANS



JÁKUP



PÓL



BÁRÐUR


Grannskoðarafelagið
RASMUSSEN & WEIHE
Statsaut. Revisorar
An associated firm of PricewaterhouseCoopers
Á Glaðsheyggi • Box 30 • FO-110 Tórshavn
Tel. (+298) 31 10 17 • Fax (+298) 31 10 18
E-mail: rasmussen@rasmussen.fo • Http://www.rasmussen.fo